# Tónlist í Norðurhøvum

Tá Atlantic Music Event verður í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið, so er talan um ein glugga, har ætlanin er at sýna norðurlendskan tónleik fram.

Ætlanin við AME er greið. Fokus skal setast á føoyskan tónleik og norðurlendskan tónleik sum heild. Tiltakið hevur verið í Reykjavík, nú er túrurin komin til Føroya og ætlandi verður farið á Vega í Keypmannahavn eisini.

Ætlanin er at skipa konsertir á høgum støði við norðurlendskum nøvnum. Og AME skal verða ein gluggi, har hesi nøvn sýna fram sínar dygdir og onnur kunnu so hyggja og lurta og meta um.

Norðurlandahúsið, Tutl, Menningarstovan og fleiri skipa fyri.

Tiltakið er ein víðari menning av Prix Føroyar kappingunum. Prix Føroyar skapti veruliga ein pall hjá føroyskum tónleikabólkum, har høvi var at spæla fyri føroyingum og tey bestu sluppu at royna seg frammanfyri útlendskum dómarum og tónleikafyriskiparum.

Eisini vóru kappingarnar beinleiðis orsøk til, at nógvir bólkar funnu saman og at nógvur nýggjur føroyskur tónleikur varð skaptur. Í ár er einki Prix Føroyar, men við 124 innkomnum uppskotum í sangskrivarakappingini, ið AME skipaði fyri herfryi, er avloysarin fyri Prix Føroyar, sum mentanarlig íblásturskelda, funnin.

Tíðin krevur sítt. Tíðin er nú komin at bjóða teim bestu at vísa sínar dygdir. Ikki at kappast, men at sleppa í sýnisgluggan at vísa, hvat tey duga. Gluggin er opin, eisini út í heim, og tá tónarnir ljóma úr hesum opna glugganum, eru óivað mong kring heimin, ið hava hug at kaga innar og lurta við.

Hetta er í hvussu er ætlanin við tiltakinum; at skapa áhuga og at hava eitt forum, har norðurlendskur tónleikur kann føra seg fram.

Endamálið er at skapa meira fokus á norðurlond og Føroyar, meira áhuga og størri sølu. Tað er ikki trupult at síggja tað skilagóða í, at hava bjóða øðrum lovandi norðurlendskum bólkum at luttaka. Umframt at føroyski tónleikaáhoyrarin fær spennandi upplivingar, og føroyska tónleikalívið fær íblástur er hetta við til at menna netverk millum føroyingar og norðurlendskt tónleikalív. Hetta ger eisini uttan iva kappingina meira áhugaverda fyri útlendskar gestir so sum plátufeløg, festivalar, umboðsfólk og fjølmiðlar.

Føroyskur tónleikur hevur ment seg nógv síðstu 15- 20 árini. Serliga tey síðstu 10 árini, eitt nú við prix kappingunum, er tann broyting hend, at føroyingar smæðast ikki við at royna flog í útlondum. Góð dømi um hetta eru tey trý Teitur, Eivør, Høgni Lisberg, ið øll hava verið við til at vinna Prix Føroyar, áðrenn tey á egnum beinum leitaðu út í heim.

Áður var talan um føroyska kapping, ið ól fram tónlistarligar dygdir. Gluggin er nú latin upp út í heim, so hesar dygdir hava møguleika at sleppa út og royna flogið. Vónandi fara fleiri sangfuglar avstað og vónandi fáa teir undanvind og mjúka lending.



## Stórur útlendskur áhugi fyri AME-Føroyar

**Tónleikaídnaðurin uttanlands verður sera væl umboðaður á Atlantic Music Event Føroyar. Miðlar úr fimm londum, festivalar, plátufeløg og tónleikaumboð koma fyri at uppliva tað besta innan føroyskan og nýggjan norðurlendskan tónleik.**

AME.FO
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Fyriskipararnir av AME-Føroyar hava skapt eitt áhugavert konsept, somikið áhugavert at ikki færri enn 20 útlendskir gestir hava boðað frá, at tey koma til Føroyar komandi vikuskiftið. Her er fyrst og fremst talan um gestir úr tónleikaídnaðinum í hinum Norðurlondunum. Men eisini nakrir gestir úr Bretlandi. Serliga væl umboðað verður Danmark. Plátufelagsstjórin Jens Ove Friis hevur longu víst áhuga í, at geva okkurt lag, ið kom inn í sangskrivarakappingini hjá AME, út í Danmark. Jelling Festivalurin og Nibefestivalurin hava boðað frá, at tey ætla sær at bjóða bólkum at luttaka á teirra festivalum.

Umframt at hvørki hinir festivalarnir ella plátufeløgini, ið eru umboðaði koma til Føroyar fyri stuttleikar. Her eru stórir møguleikar hjá tónleikalívinum í Føroyum at gera vart við seg. Fyri at geva føroyskum tónleikarum møguleika at koma í samband við útlendsku gestirnar, er Hotel Føroyar fríggjadagin seinnapart kl. 15.00 karmur um tiltakið Hitt & Hoyr.

Tiltakið vendir sær til føroyskar tónleikarar og tey, ið annars starvast innan tónleikavinnuna, og verður skipað sum ein inngangur til AME, har høvið er at hittast undir hugnaligum og óhátíðarligum umstøðum. Á tiltakinum luttaka fleiri av teim útlendsku umboðunum fyri tónleikavinnuna, ið eru komin higar at kunna seg um føroysku og norðurlendsku bólkarnar á AME.

Nøkur av útlendsku tónleikaumboðunum fara at greiða frá teirra tónleikavirksemi og annars svara teimum spurningum, sum høvi verður at seta.

### Hesir gestir hava boða frá síni luttøku á AME

Jade Richardson frá Jade Inc. er royndur promotari og talentskóti fyri nógv plátufeløg í Bretlandi

Pelle Lidell er leiðandi A&R Universal Music í Bretlandi.

Sarah-Chanderia frá Hacate Entertainment Group,

Oskar Jensen og Lars Skovgaard umboða Vega í Danmark

Jesper Kemp umboðar Beatboxbooking í Danmark

Jakob Brixvold umboðar Spælistaðið STARS, og arbeiðir eisini fyri Odeon pallin á Roskilde Festivalinum

Birgitte Hanssen Mandelid er blaðkvinna og umboðar eisini Øyafestivalen í Noregi

Paul Sullivan umboðar Clash Magazine og onnur tónleikabløð í Bretlandi

Kasper Kirkegaard og Rasmus Weng Karlsen umboða tónleikablaðið Gaffa í Danmark

Morten Madsen umboðar tónleikablaðið Musikeren í Danmark

Karina Edlund Jensen umboðar danska dagblaðið Urban

Poul Henrik Jensen umboðar danska tónleikarafelagið DJBFA

Ólafur Páll Gunnarsson og Ásgeir Eyþórsson umboða Rás Ísland

Peter Møller Madsen umboðar Nibefestivalen

Lars Charlie Mortensen umboðar Jellinge Festivalen

Jens Ove Friis er stjóri í danska plátufelagnum RecArt

Michael Callesen umboðar danska rokktónleikarafelagið Rosa